# Jarnbardur heldur fram

**Fimta róðurin á rað í ár vunnu kvinnurnar á Jarnbardi á Skála leygardagin. Hóast Riddarin hótti fleiri ferðir, hildu Jarnbarda kvinnurnar fast við oddin og fóru fyrstar um málstrikuna**

6 MANNAFØR KVINNUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Tað skal vilja øgiliga illa til, um tað ikki fer at eydnast kvinnunum á Jarnbardi at endurvinna føroyameistaraheitið*

*Mynd: Álvur*

Róðurin hjá 6 mannaførunum við kvinnum kann ikki sigast at vera serliga spennandi. Somu bátar hava fingið somu plássini á hvørjari stevnu í ár. Jarnbardur fer fyrst um málið, síðani Riddarin, Lómur, Páll Fangi og Sølmundur. Soleiðis hevur tað verið hvørjaferð, og hóast Riddarin hevur hótt Jarnbard eitt sindur tvær tær seinastu stevnurnar, so er tað ikki nógv, sum bendir á, at sigursrøðin hjá Jarnbardi verður steðgað í ár.

Á Skála legði Jarnbardur seg á odda frá byrjan. Riddarin hevði hug at hótta tær nakrar ferðir gjøgnum róðurin, men í sjálvum endaspurtinum loysnaði millum tann bláa og tann hvíta, og Jarnbardur fór um málstrikuna eina bátslongd framman fyri Riddaran. Kvinnurnar á Gongurólvi luttóku ikki í róðrinum, tí skelkurin av samanstoytinum sat framvegis í teimum.

**6 mannafør kvinnur**

1 Jarnbardur 05:14.24
2 Riddarin 05:17.20
3 Lómur 05:21.03
4 Páll Fangi 05:24.02
5 Sølmundur 05:32.19

**Signhild Petersen rør við Jarnbardi og situr á lærinum í stýriborð:**

## Tað er líka lekkurt hvørjaferð



Jarnbardur hevur vunnið sín fimta róður á rað í ár, men tveir teir seinastu hava tær verið nakað hóttar av Riddaranum úr Miðvági.

- Vit royna bara at seta meira og meira á, tí tað at Riddarin hóttir okkum, tað setur eisini okkum nógv upp. Eg ivist ikki í, at tær á Riddaranum eru uppsettar, men tað eru vit so sanniliga eisini. Hvørjaferð, sigur Signhild avgjørd á málinum.

Á Vestanstevnu verður róð í Miðvági. Signhild og hinar á Jarnbardi eru fult greiðar yvir, at tær á Riddaranum verða øgiliga uppsettar tá.

- Sjálvandi verða tær uppsettar, men tað eru vit eisini. Og sera spentar, heldur Signhild fyri.

Signhild róði ikki við Jarnbardi í fjør, men hon var við í 2000, 01 og 03 og hevur sostatt vunnið nógv við Jarnbardi.

- Tað er líka lekkurt hvørjaferð, sigur Signhild, sum tó leggur dent á, at hóast Jarnbardur hevur 35 stig, so síggja tær seg ikki sum føroyameistarar enn.

**- sae -**

# Endaspurturin hjá kvinnunum



*Hóast Riddarin hótti Jarnbard nakrar ferðir leygardagin, var ongin ivi um, hvør fór at vinna, tá avtornaði*

*Myndir: Álvur*





**Sanna á Løgmansbø rør við Riddaranum og situr í rúminum í bakborð:**

## Skulu hava betri start

Einasti bátur, sum higartil hevur hótt Jarnbard eitt sindur undir tveimum teimum seinastu róðrunum, er Riddarin úr Miðvági, men kortini hevur sigurin hjá Jarnbardi, tá ið avtornar, ongantíð veruliga verið í vanda.

- Vit royna og royna og royna at koma fram um tær. Tað er so ikki eydnast okkum enn, men vit fara at klára tær einaferð, er Sanna sannførd um.

Sanna greiðir frá, at manningin hevur tosað nógv um, hvat tær skulu gera, og hvussu tær skulu rógva á teimum ymsu stevnunum. Tær arbeiða serliga upp á startin, tí hann er ikki nóg góður, halda allar tær, sum rógva við Riddaranum.

- Men eg trúgvi eisini, at tað sálarliga spælir inn, tí Jarnbardur hevur vunnið so nógv í so langa tíð. Tískil er tað sera torført at bróta hatta mynstrið, men næstu ferð verður róð á okkara heimabana, so vit eru sera uppsettar, sigur Sanna á Løgmansbø.

**- sae -**